tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðadeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
Ítróttur: Jákup Mørk

Myndamenn: Jens Kristian Vang, Ólvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argir

Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: Sosialurin

Meðan Karsten situr á kassa doyr skúlin

Oddagrein

„Mens græsset gror dør horsemor“ er eitt danskt orðatak, sum hóskar sera væl til støðuna í føroyska skúlaverkinum í dag. „Meðan Karsten situr á kassanum doyr skúlin“ kundi tað itið á føroyskum. Og nógvur sannleiki er í hesum. Tjóðveldisflokkurin við fíggjarmálaráðharranum og sjálvstýrismálaráðharranum á odda hevur sett sær fyri at fylla uppí landskassan fyri at kunna vísa føroyingum og umverðini, at tað ber til at taka fullveldi her og nú. Tað, sum teir bara ikki tosa hart um, er, hvørjar fylgjur hesin knallharði fíggjarpolitikkurin longu hevur fyri fleiri lívstýðandi stovnar og skipanir í samfelagnum, herundir skúlaverkið og sjúkrahúsverkið. Vit skulu lata sjúkrahúsverkið liggja hesaferð men bara minna á, at landsstýrið við m.a. at ikki at játta fleiri pengar til Landssjúkrahúsið er við til at máa støði undan okkara meginsjúkrahúsi við óbótaligum skaða sum fylgju.

TAÐ ber ikki til at lata standa til í skúlamálinum, soleiðis sum leiðslan í Tjóðveldisflokkinum ger tað. Fráfarni skúlamálaráðharrin fekk ikki eitt bein til jørðina, tá hann vildi lata dyrnar upp í hesum máli og m.a. gav loyvi til at rinda lærarunum løn. Við hesi avgerð fekk hann øði í sín partamann, sum framvegis situr tungt á landskassalokinum. Og tá fíggjarmálaráðharri og sjálvstýrismálaráðharri eru „pott og panna“ í fullveldismálinum, sum kemur fram um alt annað í samfelagnum, so er ikki ringt at gita, hvørjar avleiðingarnar verða í skúlamálinum.

SKÚLIN og ungdómurin eru berarar av hesum samfelagnum, og eisini av einum møguligum komandi sjálvstýri ella fullveldi. Aktuella træan millum skúlaverkið og landsstýrið er so mikið álvarslig, at andstøðan átti at tikið málið upp í tinginum og har útvegað sær neyðugu undirtøkuna fyri at fáa glið á málið, so børnini og tey ungu koma aftur í skúla. Hvat samfelag kann liva við, at skúlastovurnar eru tómar í skjótt ein mánað í tí mest avgerðandi skúlatíðini?

LANDSSTÝRIÐ og her ikki minst Tjóðveldisflokkurin hevur ein trupulleika, sum má og skal loysast sum skjótast. Um so er, at skúlamálaráðharrin og fíggjarmálaráðharrin vilja halda fram við at venda deyvað oyrað til í hesum máli, so má tað ábyrgdin hjá løgmanni at leggja seg út í málið, so álvarsligt er tað. Tí her ræður um okkara børn, sum kunnu vera fyri dyggum smeiti seinni í lívinum, verður einki gjørt nú í stundini.

HØGNI HOYDAL og Karsten Hansen eiga fullu ábyrdina av tí, sum nú er við at henda í skúlaverkinum. Teir verða tí eisini at taka fylgjurnar av hesum. Meðan børn okkara ganga fyri vág og vind situr føroyski skúlamálaráðharrin í Keypmannahavn - í fullveldisørindum. „Framtíðin“ stendur á skránni. Nútíðin er als ikki til. Tað hevði sømt seg betur fyri eitt komandi fullveldi, um landsstýrismaðurin á økinum royndi at fáa loyst skúlamálið. Við at venda bæði lærarum og fakfelag teirra bakið er eisini hann við til at skapa enn størri ónøgd millum manna, nakað, sum bæði kann og eigur at fáa avleiðingar fyri alt landsstýrið og politikk tess.

Sosialurin

Viðmerking:

Óhugnaligt og ræðandi

Tjóðveldisflokkurin hevur misnýtt nýggju kringvarpslógina at seta síni egnu fólk í nevndirnar fyri útvarp og sjónvarp. Úrslitið er, at álitið á loftmiðlamar er burtur.

Við nýggju kringvarpslógini hevur landsstýrismaðurin í loftmiðlamálum fingið heimild at seta eina nevnd fyri útvarp og eina fyri sjónvarp. Hesar nevndir telja 7 limir hvør og skulu ráðgeva útvarpi og sjónvarpi viðvíkjandi programmvirkseminum. Nevndirnar skulu hava breiða samfelagsliga umboðan.

Gomlu útvarps- og sjónvarpsnevndirnar, sum høvdu breiða politiska umboðan, ávaraðu staðiliga móti nýggju lógini. Hon gav bæði møguleika fyri, at landsstýrismaðurin í loftmiðlamálum kundi misnýta vald sítt og eisini fyri at hann kundi mistonkjast fyri hetta.

70 % tjóðveldisfólk

Neyvan nakar í gomlu nevndunum hevur ímyndað sær, at ávaringin móti misnýtslu so skjótt skuldi gerast til veruleika og í so stóran mun, sum nú er hent. Bæði útvarps- og sjónvarpsstjórin hildu, at tað var óhugsandi, at nakar landsstýrismaður fór at tora at nýta henda møguleika, men ásannaðu, at møguleikin var til staðar.

Men tað sum ikki skuldi kunna hent, hendi. Signar á Brúnni, fyrrverandi landsstýrismaður í loftmiðlamálum setti síni egnu í stórum meiriluta í nevndirnar. Onkur tingmaður hevur nevnt, at 8 av limunum eru tjóðveldisfólk, onkur annar hevur hildið seg vita, at tey eru 10, ella við øðrum orðum yvir 70 % eru tjóðveldisfólk.

Umsitingin rennur ørindi fyri landsstýrismannin

Høgni Hoydal, nýggjur landsstýrismaður í loftmiðlamálum, sigur, at tilnevningin er eftir tilmæli frá umsitingini. So kann vera spurt, hví umsitingin gevur eitt slíkt tilmæli ? Rennur umsitingin ørindi fyri landsstýrismannin ? Allarhelst, táið slíkt tilmæli kann koma uppá tal. Breið samfelagslig umboðan er tað í hvussu so er ikki. Í øllum førðum ikki politiskt.

At nevndirnar eru ráðgevandi, broytir onki uppá skeivleikan. Meg listi at sæð tann útvarps- ella sjónvarpsstjóra, sum ikki gevur ráðgevandi nevndunum gætur. Tjóðveldið hevur so undir øllum umstøðum tryggja sær fullkomna ávirkan á loftmiðlarnar.

Óhugnaligt og ræðandi

Fyri tað fyrsta eru bæði útvarps- og sjónvarpsstjórin beinleiðis undir tjóðveldislandsstýrismanni. Fyri tað næsta er so hesin stóri meirilutin av nevndunum tjóðveldisfólk. Og fyri tað triðja er neyvan nakar í iva um, hvønn politikk stórur partur av starvsfólkunum á stovnunum halla seg at. Legg til merkis dagliga tíðindaflutningin og skrásamansetingina!

Valdsmisnýtsla

Og fyri at tað ikki skal vera lygn, er ongin fjølmiðlaábyrgdarlóg enn sett í gildi! Tí at danir ikki vilja broyta sína lóg samstundis sum teir skulu gjalda kostnaðin. Høgni Hoydal sigur, at tí skal ein føroysk gerast. Gud viti, nær hon kemur í gildi. Tí er ongin yvir ella við síðuna av Tjóðveldisflokkinum, táið talan er um ábyrgd av og ávirkan á útvarp og sjónvarp.

Valdsmisnýtslan er óhugnalig og ræðandi. Tí eigur løgmaður og løgting at grípa inn beinanvegin. Føroya fólk hevur krav uppá, at almennu loftmiðlarnir aftur gerast politiskt óheftir, so álitið kann endurskapast.

Johan Petersen
fyrrv. útvarps- og sjónvarpsnevndarformaður

Ósamanhangandi tíðindaflutningur

Helst vóru fleiri við mær,ið um vikuskifti regluliga tendraðu sjónvarpstólið fyri at frætta tíðindi frá landsfundi Tjóðveldisfloksins í Sørvági.

Smb. onkrum fjølmiðli varð lagt upp til eitt nú formansskifti, men har var »intet nyt fra Vestfronten«. Ólíka áhugin,ið varð sýndur landsfundi Sambandsfloksins fyri tveimum árum síðan, tá SvF noyddist at avbróta Gekkin í tað óendaliga tí at fullveldisministarin/varaløgmaðurin in spe mestsum breyt inn á afturlatna fundin (helst fyri yvirtíðarsamsýning) fyri at kunna sjónvarpa live frá tí,ið onkur mundi vóna gjørdist Waterloo táverandi løgmans…

Kanska stjórin á amboðskassanum hjá Høgna hevur okkurt boð uppá, hvørji »redaktionell yvirvejilsi« liggja sum grund fyri ójøvnu metingini av tíðindavirðinum á tveimum so átøkum hendingum.

Poul Martin Rasmussen,
Klaksvík

Hvussu nógv kostar ein Sandoyingur?

Aftaná at hava hoyrt skakandi etnisku roknisstykkini hjá donsku stjórnini, kom tað ikki *so* óvart á, nú ”nýggja dimma” tók tráðin upp eftir donsku lagsbrøðrunum. Vit Sandoyingar eru teir fyrstu sum skulu stúvast niður í nýfunna etniska sambandsroknileistin.

Gamaní. Tað er freistandi hjá einum ungum permustrembandi ”journalisti”at lofta nøkrum tølum, elta teimum saman við nøkrum bókstavum og hokus pokus! So nógv kostar ein Sandoyingur!

Uttan á nakran hátt at viðurkenna mær ábyrgdina av tí máta landsins politikarar hava roynt at loyst tann partin av føroyska samferðslukervinum, sum í dag eitur Meginøkið, Hestur, Sandoy, Skúvoy, so noyðist eg at viðganga ein farra av firtni, ella rættari sagt, innigyrdum fananskapi, nú eg sum sandoyingur og føroyingur, fyri aðru ferð innan eina viku verið bókførdur sum ein etnisk útreiðslukonto í hálovaða ríkisfelagsskapinum.

Sjálvur dugi eg, og nokk aðrir sandoyingar við mær, illa at síggja hví júst henda søgan skuldi varpast upp, og ei heldur við hvørjum endamáli! Um greinin hjá F.J. varð tann fyrsta av 30 viðvíkjandi samlaðu samferðsluútbyggingini í Føroyum, og hon bygdi á sakligt og væl granskað tilfar, so varð okkurt eg kundi lært av greinini.

Er endamálið hinvegin at fáa staðfest at vit Sandoyingar kosta samfelagnum meira enn gott er, so eigur viðkomandi skribentur at spenna sær skallan nakað betri, og lofta hinum tølunum sum eru við til at mynda samlaða rakstrarúrslitið fyri ymsu partarnar av landi okkara.

Sjálvur leggi eg einki at gera okkum í Sandoynni meir ella minni verd enn frændir okkara aðrastaðni í landinum. Sundurlyndi er nokk av, men ikki hevði tað verið heilt av leið um hesin góði F.J., líkasum til stuttleikar, enn einaferð spenti sær bollan, og roknaði eitt nú hvusssu nógv Sandoyggin lat føroyska samfelagnum av framleiðsuágóða og hinvegin tók aftur í almennum tænastum. Ikki er vist at etniska økið Sandoyggin tá varð skrivað við reyðum tølum í landsrokniskapinum.

Annars er tað nokk so at alt føroyska samferðslukervið, tíbetur kann nýtast bæði aftur og fram, av øllum landsins borgarum og gestum við. Eisini av F.J.

Páll á Reynatúgvu
Tjóðveldismaður og sandoyingur

Trygdin umborð á Nørrunu í lagi

Var trygdin ikki í lagi, høvdu vit lagt Norrønu alt fyri eitt, sigur Jógvan í Dávastovu, trygdarleiðari hjá Smyril Line

EYÐUN KLAKSTEIN

Trygdin umborð á Norrønu er væl kannað og í lagi.

Hetta sigur trygdarleiðarin hjá reiðarínum í einum tíðindaskrivi, sum varð sent pressuni seinnapartin mánadagin.

Tá Sosialurin leygardagin bar tíðindi um, at danska Sjóferðslustýrið fanst at trygdini umborð á Norrønu, vísti reiðaríið til skiparan segði seg verða skelkaðan av tíðindunum. Hann vísti á, at Norrøna hevði gullrein trygdarpapír.

Nú tekur eisini trygdarleiðarin á Smyril Line til orðanna móti ákoyringunum frá Sjóferðslustýrinum.

Nýggja roynd

Hann sigur, at tann brunaroyndin, sum Sjóferðslustýrið gav botnkarakter, fór fram í mai mánaði í fjør, tá Norrøna gjørdi klárt til summarsiglingina, og nýggja manningin var í ferð við at læra skipið at kenna og seta seg inn í allar trygdarskipanir. Vanliga verða tríggir dagar nýttir til hetta.

Í juni mánaði í fjør gjørdi Sjóferðslustýrið nýggja kanning av viðurskiftunum umborð á Norrønu, og tá varð staðfest, at manningin framvegis lýkur altjóða trygdargóðkenningina – tann sonevnda ISM-váttanin –sum Norrøna hevur havt síðani 1996.

– Tað er úrslitið av fyrru royndini, sum er sligin upp í fjølmiðlunum, men her má sláast faast, at um trygdin ikki var í lagi, varð Norrøna lagd beinvegin, sigur Jógvan í Dávastovu, trygdarleiðari hjá Smyril Line.

Einki at finnast at

Smyril Line vísur á, at síðani mai mánaði í fjør, tá tann nógv umtala brunaroyndin varð gjørd, hava danska, norska og føroyska skipasýnið verið umborð á Norrønu og kann trygdina, og eingin hevur havt nakað at finnast at.

– Tað skal eingin ivi vera um, at bæði reiðarí, skipari og manning framhaldandi fara at gera sítt ítarsta til, at trygdarstøðið umborð á Norrønu verður á einum høgum støði, sigru Jógvan í Dávastovu.

Neyðugt at kunna fólkatingið

Hvørki løgmaður ella Høgni Hoydal halda, at landsstýrið ger nakað skeivt, tá tað í dag fer at kunna fólkatingið um fullveldisætlanina áðrenn aðalorðaskiftið hósdagin

JOHN JOHANNESSEN

Tað er ikki heilt vanligt, at stjórnir beinleiðis hava fundir við parlament í øðrum londum. Men í dag fer landsstýrið at hava ein kunnandi fund við danska fólkatingið um fullveldisætlanina.

Orsøkin til fundin í dag er sambært løgmanni og varaløgmanni, at danska pressan hevur givið fólkatingslimum eina heilt skeiva mynd av, hvat fullveldisætlanin inniber.

Bæði Anfinn Kallsberg og Høgni Hoydal leggja dent á, at talan er um ein kunnandi fund, ið er fyriskipaður fyri at sleppa undan misskiljing av fullveldismálinum í Danmark. Talan er ikki um, at landsstýrið nú dregur fólkatingið inn í ríkisrættarligu samráðingarnar, gera bæði løgmaður og varaløgmaður greitt.

Ímóti siðvenjuni

Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin hava sent politisku flokkunum á fólkatingi skriv, har teir siga seg meta tað vera ímóti vanligari siðvenju, at landsstýrið skal hava kunnandi fund við fólkatingið.

Stóru føroysku andstøðuflokkarnir halda, at tað at tað rætta heldur hevði verið, at landsstýrið tosaði við donsku stjórnina, meðan løgtingið - har andstøðan eisini er umboðað - kunnaði fólkatingið.

Hendan tanka sigur Høgni Hoydal seg partvís skilja. Men hann leggur dent á, at tað á fundinum millum landsstýrið og fólkatingið bert er talan um kunnan.

– Tað hevði verið skeivt av landsstýrinum, um vit nú fóru at samráðast við fólkatingið. Men tað er ikki tað, vit ætla, sigur Høgni Hoydal. Hann vísir í sama sambandi á, at tað hevur stóran týdning, at fólkatingið verður væl og virðiliga kunnað um ríkisrættarligu samráðingarnar - eisini frá føroyskari síðu - og tí er einki skeivt í at halda kunnandi fundin, ið bert hevur til endamáls at upplýsa.

Nyrup dróg fólkatingið upp í leikin

Anfinn Kallsberg og Høgni Hoydal eru á einum máli um, at tað var skeivt av danska forsætisráðharranum, Poul Nyrup Rasmussen, at draga fólkatingið upp í fullveldismálið við einum aðalorðaskifti tá hol var sett á samráðingarnar. Teir vísa á, at samráðingarnar skulu vera millum millum landsstýrið og donsku stjórnina, og ikki ímillum tingini.

Landsstýrið fer nú kortini undir samskifti við fólkatingið, tá tað fer at halda kunnadi fund seinnapartin í dag. Spurningurin til løgmann og varaløgman er tískil, um tað ikki eisini er skeivt av landsstýrinum at blanda stjórnina upp í málið.

Hvørki løgmaður ella Høgni Hoydal halda, at landsstýrið ger nakað skeivt í hesum føri. Teir vísa báðir á, at talan er um ein kunnandi fund og einki annað.

– Vit fara at kunna fólkatingslimirnar, so teir eisini síggja málið frá tí føroyska vinklinum, og ikki bert frá tí vinkli,ið hevur verið frammi í Danmark, sigur løgmaður og leggur afturat at kunning eftir hansara tykki altíð er nakað gott.

Lyfta aðalorðaskiftinum

Annfinn Kallsberg sigur seg vóna, at kunnandi fundurin við fólkatingið seinnapartin í dag fer at vera við til at lyfta aðalorðaskiftið á fólkatingi um fullveldismálið upp á eitt hægri støði.

– Málið er seinastu tíðina vent beint á høvdi í Danmark. Men eg vóni, at tað fer at eydnast okkum at greiða øllum fólkatingsumboðunum frá hvat samráðingarupplegg føroyinga veruliga inniheldur.

Løgmaður vísir á, at danska pressan seinastu tíðina hevur borið boð um, at tað, føroyingar ynskja, er, at danir framhaldandi skulu gjalda fyri føroyingar gjøgnum blokkstuðulin, somuleiðis sum gjaldið skal hækka. Hetta heldur hann vísir okkum, hvussu neyðugur kunnandi fundurin við fólkatingið er.

Føroysku umboðini á kunnandi fundinum á Christiansborg seinnapartin vera Anfinn Kallsberg, løgmaður, Høgni Hoydal, varaløgmaður, og Helena Dam á Neystabø, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum.

Hvørki løgmaður ella Høgni Hoydal halda, at landsstýrið ger nakað skeivt í at kunna fólkatingið. Mynd: Jens Kr. Vang

GSM frá Føroya Tele

...so ert tú altíð har, tú skalt vera!

Vel tað GSM-haldið, ið hóskar best til tín...

Vanligt hald
1,40 kr./min. um kvøldið • Mánaðargjald: 115,00 kr.

Vinnuhald
1,60 kr./min. alt samdøgrið • Mánaðargjald: 200,00 kr.

Frítíðarhald
0,90 kr./min. um kvøldið • Mánaðargjald: 75,00 kr.

Vanligt hald
Til teirra, sum sjálvi ynskja at seta haldið saman við teimum tænastum, sum eru til taks, og har nýtslan er javnt býtt millum dag og kvøld. Við vanligum haldi kanst tú m.a. senda SMS-tekstboð.

Kostnaður fyri vanligt hald	
Stovning	500,00 kr.
Mánaðargjald	115,00 kr.
Minuttgjald - dag	2,40 kr.
Minuttgjald - kvøld	1,40 kr.
Uppringingargjald	0,40 kr.

FØROYATELE
Tel 30 30 30 • Fax 30 30 31 • www.tele.fo